Kunngerð

um broyting av ALS-gjaldinum

Við heimild í § 9, stk. 3 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

§ 1. Tað í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 9, stk. 1, nevnda ALS-gjald er 0,5 %.

§ 2. Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2003. Samstundis fer úr gildi kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum, dagfest 7. desember 2000.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina 13. november 2002

Karin Kjølbro (sign.) formaður

Elisabeh O. Gaardbo (sign.)

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsíta arbeiðsávising fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo

Almennir fundir
hjá Nes kommunu í 2003

Fundirnir eru kl. 19.00 í fundarhølinum hesar mánadagar:

03. februar	**30. juni**
03. mars	**01. september**
07. apríl	**06. oktober**
05. mai	**03. november**
02. juni	**01. desember**

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Fíggjarætlanin fyri 2003 liggur frammí á kommunuskrivstovuni í døgunum frá 06. til 20. januar 2003.

Nes kommuna

Upplatingartíðir

Nýggjár:

Leygardagin	28. des.	kl. 09-12
Sunnudagin	29. des.	Stongt
Mánadagin	30. des.	kl. 08-17
Nýggjársaftan	31. des.	kl. 08-12
Nýggjársdag	1. jan	Stongt
Hósdagin	2. jan.	kl. 10-17

Móttøka

Um ársskiftið leggur Bárður Jákupsson frá sær, eftir at hava virkað í fjórðings øld sum leiðari fyri Listaskálanum og Listasavni Føroya, og Jens Damsbo Frederiksen tekur við sum nýggjur stjóri.

Í hesum sambandi er almenn móttøka í Listaskálanum

3. januar 2003 kl. 16–18

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Listasavn Føroya

TK Stovan

Framtíðin er digital

TK Stovan kann hjálpa tær ávegis innan e-business.

Heldur tú framvegis, at e-business er háfloygt? Heldur tú framvegis, at e-business ikki er viðkomandi fyri tútt virki? Okkara starvsfólk hava lært at veita fyritøkum miðvísa ráðgeving um e-business!

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Felagið Tórshøll

Gott nýggjárs-bingo verður 28. desember kl. 20.00

Millum annað verður fekst og røst krov

Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur

Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

AWI 27 til sølu

Árg. 1990 við fiskiloyvi 5A.

tlf. 32 71 16 best eftir kl. 19.00

Seminar um partalag
(partnering)

Seminar um partalags-samstarv í byggivinnuni verður á Hotel Vágum í døgunum 15. og 16. jan. 2003 fyri byggiharrum, ráðgevarum, arbeiðstakarum og øðrum áhugaðum. Dentur verður lagdur á, hvussu hesin samstarvsháttur hevur roynst í Danmark og Føroyum, og greitt verður frá royndum higartil.

Luttakaratalið er avmarkað.

Upplýsingar um dagsskrá, kostnad o.a. fáast við at venda sær til Byggiharrasamtak Føroya, c/o Landsverkfrøðingurin, tlf. 311333, fax 314986, teldupostur lv@lv.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum

HERBALIFE
Du bliver hvad du spiser
Vægtkontrolprogram - Kosttilskud
Ring (0045) 7022 2708 eller kig på www.helsetorvet.dk

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

SAAB 900I YNSKIST
Í góðum standi, uml. 9 ár. Kann hava ein skaða ella defektan motor.
Tlf. 423572/210560

FORD ESCORT 16 - 2 HURÐAR
ynskist biliga til keyps, uml. 1.500 kr.
Tlf. 210560

FELGUR
4 felgur til Toyota Haice, árg. '89, 4 dekk 15x185 biliga til sølu.
Tlf. 210560/423572

TIL SØLU
Nýtt útstoyt, komplet til Ford Escort, árg. '89 o.l. startari, dynamo o.a.
Tlf. 210560

TIL SØLU
4 sportfelgur til Bluebird T12 til sølu fyri 1.000 kr. Elrútavindari v/f hurð o.l. sentrallás fyri 400 kr.
Tlf. 210560

VETRARDEKK TIL SØLU
4 stk. góð heilársdekk stødd 205/65-15 til størri persónbilar 2000 kr. og 4 stk. pikadekk. Stødd 185/65-15 1800 kr.
Tlf. 210808 ella 314198

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Honda Accord 2,0 114 hk, árg. '91. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur powerstýring, centrallás, elrútar, el-spegl og er væl skoddur. Prísur: 30.000,- (uml.) Ring og gev eitt boð.
Tlf. 224001

PEUGEOT 306 HDI
árg. apríl 2000. Bilurin er sum nýggjur.
Tlf. 423495 ella 222154

FORD ESCORT SAVOY
árg. 88 biliga til sølu. 1/2 ára gamalt stereo-anlegg. Nývirði 8.000,- + eyka felgur við píkum fylgja við. Okkurt smávegis at gera við.
Tlf. 224058

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 09/87 hvitur, til sølu fyri 8.000 kr. Koyrir væl, men krevur smávegis ábøtur, sýnaður juni 2002. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 312602

FELGUR TIL TOYOTA COROLLA
F4 felgur 14" við summardekkum
Telefon 218159

VØRUVOGNAR
Tveir Corolla vøruvognar Diesel árg. 87, báðir hava nr. plátur, til sølu.
Tlf. 229441

TOYOTA COROLLA
diesel, vøruvognur, árg. 87, hevur nr. plátur til sølu.
Tlf. 229441

STATIONVOGNUR TIL SØLU
Ford Escort stationvognur 1.8 turbo diesel við intercooler. Við m.a. króki, cd-spælara og 17" alufelgum. Ring og hoyr nærri á
Tlf. 228649

MAZDA 626 2.0 GLX TIL SØLU
Árg. 11/96, koyrt 64.700 km. Bert ein eigara. Hevur servostýring, nýggj píkadekk, Pionér radio v/ bandspælara, centrallás og aðrar hentleikar. Prísur um 90.000 kr.
Tórfinn 333259/213259

FORD ESCORT 1.6D
árg. 87 nýsýnaður, sera økonomiskur til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 226479 eftir kl. 15.00

BMW 325i
til sølu, árg. 1988.
Tlf. 223802 ella 445065

NISSAN PATROL 3.3
TD, árg. 88 til sølu. Nýsýnaður tann 18.12.02.
Tlf. 217317

CHEVROLET VAN.
Diesel, árg. 89, til sølu. Bilurin kann eisini síggjast á www.bil.fo
Tlf. 213131

NISSAN MICRA
árg. 88, sera økonomiskur til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 263874

BMW 524 TD DIESEL
árg. 90 til sølu. Bilurin hevur tvey sett av sportfelgum við dekkum 225/55/16 og 195/65/15. Hevur nýggjan motor og sær gott út. Gott anlegg kann fylgja við. Ring, so tosa vit um prísin.
Tlf. 253599 ella 252819

TIL SØLU
Mazda 626 2.0 GTI, árg. 10.86 til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 210234

TIL SØLU
Opel Astra Turbo Diesel, 2 ára gamal.
Tlf. 313607 - 217382

OPEL VECTRA 2.0i
svartur, árg. 90, nýsýnaður, sportfelgur + eykasett av stálfelgum við píkadekkum, sær gott út.
Tlf. 220089

NISSAN PATROL 3.3 TD
6-cyl. motor, árg. sept. 85, sýnaður mai 02, koyrir perfekt, í góðum standi, hevur setur aftan. Styttra modellið.
Tlf. 228707

TOYOTA CAMRY 1.8 SL
árg. 87, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 215291 ella 455291

BMW 318i CABRIOLET
árg. 1991, 125 HK í góðum standi. Leðursetur, sportfelgur, summar og vetrardekk fylgja við. Til sølu fyri umleið 85.000 kr.
Tlf. 507101

NISSAN PRIMERA TIL SØLU
Ein grønur Nissan Primera 1.6 árgang 96 til sølu. Bilurin hevur nógva eykaútgerð.
Ring og hoyr nærri á tlf 457159 ella 265412

HONDA ACCORD
Km. 271.000, árg. 1987, sýnaður: 25.11.02, elrútar, -sóltak og -spegl, servo o.a. til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 448043

PEUGEOT 406
árg. 96, við stórum frontskaða til sølu.
Tlf. 213267 ella 313267

TIL SØLU
Mazda 626 Coupe, árg. '89, defekt toppstykki.
Tlf. 441740, 281740, 221759

MAZDA 323
árgang 88 til sølu, við píkadekkum, koyrur ikki, men hevur plátur. Sýnaður jan. 2002. Til sølu fyri 4000 kr.
Tlf. 310337 ella 226671 eftir kl. 16.00

TOYOTA CARINA II
1.6 frá 1989 við skaða, til sølu!
Tlf. 223183

TOYOTA CARINA II 2,0
til sølu.
Tlf. 227552 - 210919

TOYOTA COROLLA
frá 89, til sølu.
Tlf. 371766

MAZDA 323
Vegna umsýn selji eg mín Mazda 323, árg. 86/87, myrkabláur, góður til eykalutir. Biliga til sølu.
Tlf. 217686 ella 317686

Amboð

BRØYT TIL SØLU
Brøyt X21 II til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 214301

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
Tilkomin kvinna, sum kundi hugsað sær arbeiði sum hjálparfólk í barnagarði frá 1. januar. Havi royndir.
Tlf. 228408

Barnaútgerð

TIL SØLU
Barnavognur úr Skemmuni til sølu fyri 2.000 kr. Nýprísur 2.750 kr. Lítið brúktur. Alt tilhoyr fylgir við.
Tlf. 321265 ella 253491

TIL SØLU
Grulvigarður, 200 kr. Skrástólur, 150 kr.
Tlf. 316027-407

Bátaútgerð

FISKILOYVI YNSKIST TIL KEYPS
Fiskiloyvi í bólki 6 (útróðrarbátar undir 15 tons) ynskist til keyps.
Bill.mrk. 1494

VÍKINGUR 800
Spildurnýggjur, longd útgáva, l.o.u. 9.90 m. Volvo 450 HK, ferð 26 mil. Kann leverast beinanvegin. Áhuga ringið til
Oddmar 229088/318649

KØBES
Redningsflåde 4 pers.
Tlf. 228058

Bingo

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 29. kl. 16.00. Full pláta á nýggjárskurvar og 8 x 500 kr. + síðuvinningar. Gávukort annars til øll spølini + til lutaseðlarnar. Á lutaseðli 3 nýggjárskurvar og 3 x 1000 kr. Bingola, eykaspæl, koyring heim. Vit ynskja øllum okkara stuðlum eitt gott nýggjár.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði millum jóla og nýggjár. Lýst verður í Útvarp Føroya. 2 ísl. krov verða eisini at vinna á lutaseðli.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 30. des. kl. 19. Eisini verður eykaspæl og bingola.
Astma og Allergifelagið

GOTT NÝGGJÁRSBINGO
verður 28. des. kl. 20.00. M.a. at vinna verða 2 røst krov og eykaspæl.
Tórshøll

KAGGIN
Gott nýggjársbingo verður sunnukvøldið 29. des. kl. 20. 15 vinningar á lutaseðli, m.a. 3 gávukort á 1.000 kr. Eisini verður spæld bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

Bøkur

SKÚLABØKUR TIL SØLU
Bøkur til 1. skeið á maskinmeistaraskúlanum (M1) fáast fyri 1/2 pris.
Tlf. 223265

Burturm. /funnið

LYKLAR BURTURMISTIR
fríggjakvøldið 13. des. í miðbýnum. Um nakar hevur funnið teir, vinarliga ring
tlf. 219615

HUNDASNÓRUR MISTUR
Reyður hundasnórur burturmistur.
Tlf. 313365

BRILLUR BURTURMISTAR
Havi mist mínar dýrabaru brillur vekk fyri einari viku síðani; stellið er myrkt (brúnt - svart). Møguliga eru tær burturmistar í Kagganum. Hevur nakar funnið tær, vinarliga sig frá.
Tlf. 316606

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig kvinna við 3 børnum søkir íbúð frá 1. jan. 2003 – helst í miðstaðarøkinum.
Tlf. 262161 eftir kl. 18.00

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Góð, fult møblerað 2 ver. íbúð til framleigu frá 1.1.03. til 30.6.03 á Vesterbro. 1 mór. depositum krevst.
Tlf. 315560 ella 222630

ÍBÚÐ TIL KEYPS
56 ára gomul kvinna søkir íbúð til keyps í Havn.
Tlf. 315036 el. 213034 eftir kl. 18.00

ÍBÚÐ SØKIST AKUT
1. jan. í Havn ella á Argjum til kvinnu við tveimum børnum. Má hava minst 2 kømur.
Tlf. 215240

HÚS ELLA ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN
Hava tit okkurt at bjóða mær, gleði eg meg at hoyra frá tykkum. Eg eri álítandi, gjaldi til tiðina og royki ikki. Havi eisini fast starv.
Tlf. 317724 eftir kl. 16.00, Dagbjørg Hjaltalín

KOLLEGIUMKAMAR TIL LEIGU
Eitt møblerað kollegiumkamar í Keypmannahavn er til framleigu frá nú av og allan januar mánað 2003. Ringi á
Tlf. 0046-20760967 ella 373619

KAMAR TIL LEIGU
í vesturbýnum við atgongd til køk, boð og vaskimaskinu.
Tlf. 221158 ella 313799

HÚS YNSKIST
Hús ella íbúð ynskist til leigu í Eysturoynni, helst í Gøtu.
Ringið 506164

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, boð og vaskimaskinu.
Tlf. 313799 ella 221158

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig tilkomin kvinna søkir íbúð í Havn frá 1. januar.
Tlf. 228408

Dansur

DANSUR Á STRONDUM
Audio spælir til dans á Strondum nýggjársaftan.
Strálan

FRÁ NÝGGJÁRSNEVNDINI Í RUNAVÍK
Góður gamlamannadansur verður í Ítróttarhøllini í Runavík nýggjársaftan. Dymar lata upp kl. 01.00. Brak spælir.
Nýggjársnevndin í Runavík

KJØLAR Í HVALBA
Kjølar er ein av best umtóktu dansibólkum í Føroyum nakrantið. Teir hava ligið stillir í eina tíð. Teir eru nú endurreistir, men bert í stutta tíð. Einasta høvi at hoyra teir í Suðuroy í hesum umfari, verður í Roynhøllini 28. desember
Bóltfelagið Royn

Dýr

UNDULATUR
Sera fittur og elskiligur 1 ára undulátur + búr til sølu fyri 50 kr. Hann má sleppa at flúgva av og á.
Hildur, tlf. 314500

HUNDAHVØLPUR
Ein fittur brúnur puddil hundahvølpur, 12 vikur gamal, verður latin djóravini.
Tlf. 361687

HEY HEY!
Er tað nakar, sum hevur eitt hamstrarabúr til sølu.
Ring á tlf. 255319 ella 318708

HUNDAHVØLPAR
2 fittir hundahvølpar verða latnir djóravinum. Teir eru svartir við eitt síndur av hvítum. Kunnu fáast beinanvegin.
Tlf. 224806

HYGG HER!
Labrador hvølpur ynskist.
Tlf. 256900

KANINUNGAR TIL SØLU
Tríggir sera fittir kaninungar til sølu fyri 50 kr. stk. Seljast bert til djóravin.
Tlf. 424248

VIT HAVA EIN
fittan 12 vikur gamlan Border Collie hundahvølp. Áhugað
ringið 441238 aftaná kl. 19.00

HAMSTRARABÚR
til sølu, 2 hæddir, nógv tilhoyr fylgir við. Ring og hoyr nærri á
tlf. 217802

LABRADOR YNSKIST
Ein ektaður labrador hundahvølpur ynskist.
Tlf. 220606

KETTLINGUR YNSKIST
Av tí at vit hava mist okkara fittu kettu, vilja vit fegin hava ein spakan, fittan kettling, gjarna uttan hala... Um tú veitst onkran, so vinarliga ring á
tel. 253766

GÁSARUNGAR
Livandi ella grýtuklárir.
Tlf. 422228

Fundir

ÆGIR
Aðalfundur verður hósdagin tann 23.01.2003 í sangstovuni á Ziskatrøð. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Miele uppvaskimaskina til sølu.
Telefon 748159

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:

Navn:…….

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki